


Lýsing hjá Charles Mauritzen í 1969




*Hetta er fyrsti bilurin hjá Allan Brockie, ein Austin Mini 850, sum hann keypti í 1964. Fyrr var tað "prestiga" í at hava ein flotta nummarplátu sum hesa, har øll tølini eru eins*



*Alec Issigonis við trimum bilum sum hann teknaði: Austin 1800, Austin 1100 og Austin Mini*



*Alan kennir alt til Mini. Her hevur hann toppstykkið á motorinum av og skiftir topp-pakningin. Arbeiðið verður gjørt á einum kampinplássi við Gardarsjógvin í Italia í 1972*



*Her sami bilurin umborð á Sundaferjuni, sum sigldi millum Hósvík og Selatrað, áðrenn Norðskálatunnilin varð tikin í nýtslu. Bilurin er lakkeraður við øðrum litum og útgjørdur við t.d. dupultum halogenlyktum, sportfelgum og tilhoyrandi størri skermum*

blaðið Magn frá 1976 til 1979.

Í 1982 byrjaði Alan aftur á eykalutagoymsluni í fyritøkuni, sum tá hevði skift navn til Robert P. Brockie & Co, og Derek Brockie, beiggi Alan, hevði tikið yvir søluna av bilunum við navninum »Bilcentrið«, ið seinni bleiv broytt til »D. B. Bilar«.

Alan arbeiddi annars í fleiri ár við bilum hjá D.B. Bilum til nakað eftir at fyritøkan varð seld til Berg Motors í 2005. Í dag arbeiðir Alan bæði sum sjálvstøðugur myndamaður og sum myndamaður hjá Dimmalætting.

Alan sigur, at tá hann byrjaði í fyritøkuni, kostaði ein Austin Mini millum 11 og 12.000 krónur. Mini bilarnir vórðu framleiddir frá 1959 til 2000.

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*